## Oljuprísur onga ávirkan

Hóast oljuprísurin er hækkaður sera nógv á altjóða marknaðinum ta seinastu tíðina, er Grønland í teirri serstøðu, at príshækkingin hevur onga ávirkan havt har. Orsøkin er sambært stjóranum í KNI, Søren Lennert Mortensen, at oljudeildin Polaroil hevur hevur havt hepni við oljukeypinum. Søren Lennert Mortensen sigur við KNR, at tað slepst kanska ikki undan onkrari lítlari príshækking, men at prísurin verður støðugur næstu tvey árini.



*Grønlendingar sleppa undan stórum príshækkingum á olju (Mynd: Sermitsiaq)*

## Amerikumenn spardu

Amerikanarar vóru ikki so dúgligir at renna í handilin í februar, og tað gjørdi, at vøksturin var tann minsti síðani septembur í 2006, skrivar Bloomberg. Tað kom kortini ikki óvart á búskaparfrøðingarnar, sum høvdu væntað, at vøksturin í februar fór at liggja um 0,1 prosent samanborið við januar. Bloomberg skrivar, at teir amerikonsku brúkararnir eru undir trýsti, og at støðan á íbúðarmarknaðinum hevur stóra ávirkan á ta privatu nýtsluna.

# Ræðandi hagtøl



*Sjúrður Skaale nýtti høvið á flokstingi Tjóðveldis at greiða eitt sindur frá fólkatingsarbeiðinum*
*Mynd: Leo Poulsen*

**Sjúrður Skaale nýtti høvið á flokstinginum hjá Tjóðveldi, at greiða eitt sindur frá fólkatingsarbeiðinum, eitt starv, hann skal røkja, til Annita á Fríðriksmørk kemur aftur úr barnsburðarfarloyvi**

FÓLKATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á flokstinginum hjá Tjóðveldi við Gjógv leygardagin nýtti Sjúrður Skaale høvið at greiða eitt sindur frá tí arbeiði, hann nú røkir sum fólkatingslimur Tjóðveldis.

Eitt av málunum, sum hann júst nú stríðist við, er eitt uppskot um at skerja stuðulin til Norðurlandahúsini. Hann roynir at ávirka danskar politikarar soleiðis, at hesin stuðul ikki verður skerdur.

Norðurlandahúsini eru í Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Álandi.

Hóast Sjúrður Skaale bert hevur verið fólkatingslimur í seks vikur, hevur hann verið rættiliga úti um seg. Umframt hetta týðandi málið, hevur fólkatingslimurin hjá Tjóðveldi eisini eina áhugaverda kanning á skránni, nevniliga kanningin um, hví so fáir føroyingar koma heim aftur eftir loknan lestur.

Sjúrður Skaale greiddi frá, at hann hevði tosað við eina kvinnu, sum er studentur frá 1997. Hon greiddi frá, at í flokki hennara hevði meginparturin tikið hægri útbúgving, og tað var jú hugaligt at hoyra, men hon kundi samstundis siga frá, at meiri enn helmingurin av árganginum í dag býr uttanlands. Og hetta er júst kjarnan í málinum og tað, sum Sjúrður Skaale vil finna greiði á, hví so er.

### Danir skilja

Sjúrður Skaale dylir ikki fyri, at hann metir júst hetta sum størsta vandamálið yvirhøvur, og tí leggur hann nógv fyri, til tess at fáa framt hesa kanningina.

Hann upplýsti, at kanningin fer at kosta meiri enn hann kann fíggja umvegis fólkatingið, og tí hevur hann loddað dýpið hjá privatum og almennum fyritøkum fyri at fáa fíggjað kanningina.

Millum onnur mál, sum fólkatingslimur Tjóðveldis nevndi, var, at danir í veruleikanum væl skilja føroyska ynski um at standa á egnum beinum.

- Setur tú teimum spurningin, um teir sjálvir høvdu vilja verið undirlagdir øðrum landi, eru teir ikki í iva. Teir skilja væl føroyska ynski um fullveldi, tí soleiðis ynskja teir sjálvir at liva, segði Sjúrður Skaale.

Hann vísti á, at danir sum politikarar eru ímóti føroyskum fullveldi, men tað er eina og aleina av politiskari plikt. Persónliga hava teir eina heilt aðra meining, vildi Sjúrður Skaale vera við.

# Tjóðveldi nýggja nevnd



*Nýggja nevndin í Tjóðveldi frá vinstru: Tórbjørn Jacobsen, Barbara Holm, Hallur Ellingsgaard, Heidi Petersen, Áki Jacobsen, Jónfríð Hjelm og Høgni Hoydal*
*Mynd: Leo Poulsen*

**Fríggjakvøldið avgreiddi flokstingið hjá Tjóðveldi formellu spurningarnar so sum roknskap, innkomin mál og val av nevnd**

FLOKSTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Lagt varð fyri á flokstingi Tjóðveldis fríggjakvøldið við at avgreiða roknskap, viðgera og atkvøða um innkomin uppskot og at velja nýggja starvsnevnd. Roknskapurin varð fyrst fyri, og varð hann samtyktur.

Síðani komu tey ymsu innkomnu uppskotini fyri. Seks uppskot vóru komin inn, harav tvey vóru uppskot um lim í starvsnevndina. Annað frá Norðoya tjóðveldisfelag um at velja Jógvan Ravnsfjall í starvsnevndina, nú Heini O. Heinesen er valdur á ting. Hitt var frá Suðuroyar Tjóðveldisfelag um at velja Jónfríð Hjelm í starvsnevndina. Flokstingið valdi seinni nevndu.

Eitt annað uppskot frá Norðoya Tjóðveldisfelag um broytingar í bygnaði og skipan Tjóðveldis vann ikki frama.

Eitt av broytingaruppskotunum var, at starvsnevndin skuldi víðkast við einum limi frá Unga Tjóðveldi. Hetta uppskot varð samtykt so nevndin nú telir 7 limir

Uppskotið hjá starvsnevndini um at staðfesta nýtta búmerkið varð samtykt. Uppskot frá Sandoyar Tjóðveldisfelag um uppstillingarskipan til løgtingsval varð útsett, og at enda varð uppskotið hjá Unga Tjóðveldi um at fáa ein lim í starvsnevndina samtykt.

Nýggja nevndin sær nú soleiðis út: Høgni Hoydal, formaður, Tórbjørn Jacobsen, næstformaður, Heidi Petersen, Barbara Holm (UT), Jónfríð Hjelm, Hallur Ellingsgaard og Áki Jacobsen.